# Ávaring: Kanska onkur tekur sær frælsi at skriva pizza!

SJÚRÐUR SKAALE



**Kanska er tað í lagi, at Alexandur og Victoria eta pizza áðrenn tey hava sex. Kanska Una Arge ikki nýtist at óttast teirra frælsi...**

Eg skal ikki troytta fólk meira, men kenni meg noyddan at svara onkrum av tí, sum Uni Arge skrivaði um hetta góða alfabetmálið í gjár.

UA sigur at: »Veruligi boðskapurin hjá Sjúrða Skaale er, at vit skulu lata vera við at menna og skapa okkara egna mál.« Men havi eg sagt nakað, sum bendir á tað? Hvar? Nær?

UA heldur eisini at tað, eg í veruleikanum sigi, er: »Tú ert eitt bygdasligt, afturhaldssinnað grenj, um tú ikki tekur undir við mínum uppskoti« - Men havi eg sagt nakað, sum líkist hesum? Kunnu onnur nú eisini, púra frítt, siga hvat »veruligi boðskapurin« hjá Una er?

UA óttast fyri at »fólk fara at taka sær frælsi at skriva (...) pizza í staðin fyri pitsa.« Men hví er tað so ræðuligt? Hví ræðist Uni so illa at fólk »taka sær frælsi«, tá tey skriva sítt egna mál? Er tað nakað at ræðast? Tað gera fólk í dag. Tey skriva pizza. Og CO2. Og CTD. Og www.com. Og Zachariassen. Er tað so ræðuligt? Vil Uni hava fólk at skriva »seks« í staðin fyri sex? Og hví er tað betri?

Uni kallar hetta »Ein fáfongd roynd at tykjast nútímans og tekkjast flest møguligum opportunistum, sum innast inni ikki tíma at taka málsliga spurningin í álvara, lítið og onki innlit hava í málsøguligar veruleikar og enn minni tíma at læra seg føroyskt.« Meirilutin av føroyingum heldur, at alfabetið skal víðkast. Man orsøkin bara vera, at øll eru dovin og býtt og søguleys? Ella kann tað hugsast, at tey vilja hava alfabetið at endurspegla veruleikan?

**Kanska frælsi er OK?**
UA sigur at »Tað er sjálvsagt, at føroyingar skulu kunna skriva Ný Sæland í staðin fyri New Zealand, Kili í staðin fyri Chile og Kristian í staðin fyri Christian. Hetta hevur verið málfrøðiliga kósin í heila øld.« Men tað passar ikki. Tann radikala linjan er spildurnýggj.

UA sigur: »...og við áganginum hjá løgtingsmanninum á tey, sum sita í navnanevndini« - What? Havi eg framt ágang á hesi fólk?

UA spyr um Navnanevndin skal »føra málpolitikk eftir høvdinum hjá einum einstøkum løgtingsmanni?« Nei. Men kanska skal eingin taka sær rættin at definera, at ein rúgva av føroyskum nøvnum eru skeiv - til stóran ampa fyri nógv.

Kanska skuldu myndugleikarnir bara havt eitt lítið sindur størri virðing fyri fólki.

Kanska er tað í lagi, at Alexandur og Victoria eta pizza áðrenn tey hava sex.

Kanska skulu myndugleikarnir bara geva teimum frið til tað.

Kanska er teirra frælsi einki at ræðast.

---

# At vita, ella at halda seg vita

ROLF GUTTESEN

rg@geo.ku.dk



**Svar til Árna Dahl**

Málfelagið hevði boðið til fundar leygardagin í Miðlahúsinum. Framløga var um staving av geografiskum nøvnum. Eivind Weyhe greiddi frá arbeiðinum hjá ST-felagsskapinum UNGEGN við at standardisera skrivingina av geografiskum staðanøvnum. Sjúrður Skaale tosaði um gongdina í ABC-málinum, sum fekk undirtøku í Løgtinginum, og hvat víðari kann fara at henda við tí. André Niclasen hugleiddi um møguleikarnar at fáa eitt breiðari málráð enn tann núverandi málnevndin, og um uppgávurnar hjá einum málráði.

Har var fult hús, eini 60 fólk vóru komin at lurta og skifta orð henda illveðursdag. Hetta var eftir mínum tykki ein góður og sakligur fundur. Men ov fá, sum eru ímóti hesum broytingaruppskotum, vóru til staðar. Bert ein maður hevði ta meining, at føroyska Heimsatlassið við teim serligu landanøvnum, sum har eru at lesa, var gott og í lagi.

**Árni Dahl greiðir frá**
Nú hevði Árni Dahl eina viðmerking í mánadagsdimmu til henda fund og nógv ymiskt annað. Lat yvirskriftina fara (Við Sjúrði Skaale og sprokforeiningini aftur til København). Hatta er so býtt og frekt, sum nakað kann vera.

Árni var mær vitandi ikki sjálvur á fundinum. Men nevnir allar fýra, sum høvdu innlegg, við navni og ein aftrat. Árni er sorgarbundin um, at færri og færri taka undir við nationalistisku mál-purismuni, sum í alt ov langa tíð hevur verið næstan einaráðandi.

**Hvør ynskir seg aftur til gamlar dagar?**
Stílurin hjá Árna er at gita, hvat ið onnur meina, og so at skjóta eftir tí. Nú fáa vit, sum vóru á fundi í Miðlahúsinum henda dag, at vita, at »*hesi fólk ynskja seg aftur til tíðina, tá ið danskt embætisvald ráddi fyri, hvussu føroyskt skuldi skrivast*«.

Góði Árni – hesin setningur er høpisleysur upp á fleiri mátar. Eg kann siga – meini, at hinir tríggir halda nakað tað sama - at eingin okkara ynskir seg aftur til farnar tíðir, hvørki so ella so. Tú vart ikki á fundi, men um tú hevði verið har, so hevði tú einki hoyrt, sum kundi útleggjast á hendan hátt. Annars var tað ikki embætisvaldið, ið gjørdi reglur fyri føroyska rættskriving og hvussu kirkjubøkur skuldu førast. Tað mundi vera onkur hægri løggevandi stovnur.

Árni gremur seg um, at »tey«, sum hann tekur til »*stevna til fundar og breiða seg í vørpum. Og tey skriva lesarabrøv í bløðum og á portalum.*« Ja, ólíka lættari hevði verið hjá tær, um tú og títt partí hevði monopol.

**Og so gloymdi hann eitt gamalt portur**
So skula vit sjálvandi eisini setast í bás: »*Teirra altjóðagerð er rótfest innan grindirnar í Keypmannahavn, ta norðaru, eystaru og vestaru*«. Helst man Árni meina við tey gomlu portrini í Vollanum rundanum býin. Nørreport og so víðari. Men, jamen Árni? Tú hevur gloymt eitt portur, ella hevur tú ongantíð lagt til merkis, at á Christianshavn út móti Amager er ein Sønderport???

Helst man hann meina, at tey, sum hava gingið í býnum við hesum portrum hava fingið skaða. Men hvat er tað, sum er skaðiligt? Býurin, stórbýurin, høvuðsstaðurin, portrini, sum teir rivu niður fyri umleið 150 árum síðani. Er tað tað, at Keypmannahavn er danskur býur, ella hvat?

**»Eitt nú í Danmark….«**
Aftur til sakina. Ilt er at diskutera nakað við ein mann, sum ikki veit, men bara heldur seg vita. Tú heldur teg vita (og skrivar so): Hví eitur tað Hetland og ikki Shetland? og tú skoytir eina parentes uppí: (danir siga jú Shetland). Í hasum eru longu tvær misskiljingar, tí mítt uppskot er at respektera, at føroyskt mál hevur nakrar traditioneller ella konventionellar formar, tá tað kemur til staðanøvn í fremmandum londum. Eitt er nettupp Hetland, sum er gamalt ella vanligt føroyskt. Men tað eru ikki bara danir ella danskarar, ið siga Shetland. Tað siga hetlendingar sjálvir, og skottar og eingilskmenn.

Og vit fáa meira av somu skuffu. »*Boðskapurin hjá hesum "nýggju" málreinsarunum er tann sami: Vertin liggur á, um tey, ið búgva á Grønhøvdaoyggjunum, tala portugisiskt og skriva og siga Cabo Verde. Í Føroyum skula vit skriva Kap Verde, tí soleiðis gera tey í øðrum londum – eitt nú í Danmark.*« Soleiðis er tað nettupp *IKKI* sagt ella skrivað í mínum uppskoti.

Eg kann bara svara tær: Tú veitst ikki, hvat tú skrivar um. Men tú heldur teg vita.

---

# 10. flokkur í Tórshavnar Kommunu

MARIA HAMMER OLSEN

Býráðslimur í Tórshavnar kommunu



Nú nógv hevur verið at hoyrt um 10. flokk í Tórshavnar kommunu, havi eg hug at koma við mínum ískoyti.

Í 2006 varð ein arbeiðsbólkur settur, sum skuldi gera eitt álit um framtíðar 10. flokk í Tórshavnar kommunu.

Arbeiðssetningurin hjá bólkinum var soleiðis orðaður:

»Arbeiðsbólkurin verður biðin at koma við uppskoti, hvussu 10. flokkur skal verða skipaður undirvísingarliga í framtíðini, og um hann skal verða skipaður í eina eind ella fleiri eindir.«

Burturúr hesum arbeiði komu 2 tilmæli. Eitt minnilutatilmæli um at skipa 10. flokk í 2 eindir, eina í Kommunuskúlanum og eina í Eysturskúlanum.

Meirilutatilmæli ljóðaði soleiðis:

»Meirilutin í arbeiðsbólkinum mælir til at savna allar 10. floks næmingarnar í Tórshavnar kommunu í **ein sjálvstøðugan skúladepil** frá skúlaárinum 2008/2009 við **egnari leiðslu** og **lærarum**, sum burturav arbeiða í hesum skúla«. Meirilutin mælti til at savna 10. flokk í Eysturskúlanum.

Býráðið samtykti at taka undir við meirilutatilmælinum, tó so at ætlanin bleiv útsett til skúlaárið 2010/2011.

Skjótt var tó greitt, at **eingin sjálvstøðugur skúladepil** bleiv. Mentamálaráðið góðtók **ikki egna leiðslu**, men segði, at 10. flokkur skuldi vera ein partur av Eysturskúlanum. Lærararnir skuldu nú í mest møguligan mun arbeiða við 10. flokki.

Við øðrum orðum so er býráðssamtyktin ikki í samsvar við veruleikan, og tað er ein av orsøkunum til, at málið er tikið uppaftur.

Eg hoyrdi í útvarpinum býráðslim siga, at um 10. flokkur framhaldandi skuldi vera í Kommunuskúlanum, vóru vit býráðslimir kanska noyddir at útseta byggingina av Røktarheiminum yviri við Strond, tí tað kom at kosta nógvar pengar at umvæla skúlan her og nú. – Hetta er ikki at skemta við, men eg havi hug at endurgeva mín fyrrverandi arbeiðsgevara, tá hann spurdi: »Hvat dámar tær betri pannukøkur ella ólavsøku?« – 10. flokkur og Røktarheimið hava onki við hvørt annað at gera, og eitt mál sum Røktarheimið skal ikki brúkast at ræða fólk við.

Í hesum sambandi skal eg taka burturúr áður nevnda áliti, har fyrimunir við at hava 2 eindir vera nevndir:

»Fyrimunir kunnu vera:
- skjótt at seta í verk
- ikki neyðugt at gera stórar íløgur«

Hetta vóru orðini tá. – Tørvur er á at umvæla Kommunuskúlan, óansæð um 10. flokkur er har ella ei. – At missa so nógvar næmingar kann harafturímóti hava álvarsligar avleiðingar fyri skúlan.

Kommunskúlin hevur uml. 80 næmingar í 10. flokki og hevur koyrt eftir einum leisti tey síðstu 4 árini, sum hevur víst seg at rigga sera væl og sum bæði lærarar, næmingar og foreldur eru glað fyri.

At kapping er millum skúlar er bara til gagns fyri næmingin.

Mín vón er, at vit í framtíðini hava tvær 10. flokseindir í Tórshavnar kommunu, eina á Eysturskúlanum og eina á Kommunuskúlanum.